# JANUS OPEN
## 17. januar 2025 – 19. januar 2025

Skipað verður fyri minningartalvkapping í Kolshøll á Eiði vikuskiftið 17. januar – 19. januar 2025. Janus í Løðuni var ein týðandi partur av talvfelagnum Róki, og vilja vit tí við hesi kapping minnast Janus, sum bleiv tikin frá okkum alt ov tíðliga. Janus andaðist 6. juli 2024, einast 46 ára gamal.

***Stað:*** Kolshøll, Kolsvegur 8, 470 Eiði.

***Skipan:*** Kappingin er partur av GP kappingini 2024/25 hjá TSF. Kappingin er opin fyri øllum telvarum, ið hava minni enn 2400 í rating. Telvað verður soleiðis:

1. - 3. umfar fríggjdagin 17. januar klokkan 18.00
4. umfar leygardagin 18. januar klokkan 10.00
5. umfar leygardagin 18. januar klokkan 14.00
6. umfar sunnudagin 19. januar klokkan 13.30
7. umfar sunnudagin 19. januar klokkan 17.00

***Tíð:*** 1. – 3. Umfar verður telvað við tíðini 10 min. + 5 sek. pr. leik
4. – 7. Umfar verður telvað við tíðini 60 min. + 30 sek. pr. leik

***Vinningar:*** Samlaðu vinningarnir verða 25.000 kr.

Nr. 1 5.000 kr. Nr. 2 3.000 kr. Nr. 3 2.000 kr.

2 x ratingsvirðislønir eru í hvørjum bólki á 1.000 kr. og 500 kr. Bólkarnir eru hesir: undir 2200, undir 2000, undir 1800, undir 1600, einki ratingtal, besta kvinna, født eftir 2013 (u12), født eftir 2009 (u16), født áðrenn 1976, født áðrenn 1961.

***Tilmelding:*** Tilmelding fer fram við at senda teldupost til kappingarleidarin@faroechess.com. Upplýsast skal fult navn og føðidato. Luttøkugjaldið er 100 kr. Pengarnir skulu flytast á kontonr. 6460-152.368.8. Seinasta freist at melda seg til er hósdagin 16. januar kl. 12.00.

***Fríumfar*** Møguleiki er at biðja um upp til 3 frí umfør. Fyri hvørt frí umfar fær telvarin 0,5 stig. Um ynski er um frí umfar 1. umfar, skal hetta biðjast um skrivliga við at skriva til kappingarleidarin@faroechess.com. Hini umførini skal dómarin hava boðini skrivliga. Biðjast skal um frí umfar áðrenn parað verður.
7. umfar er ikki møguligt at biðja um frí umfar.

Vónandi verður stuðlað væl undir talvkappingini, soleiðis at vit verða fleiri, sum koma saman at minnast Janus.

**Við talvkvøðu**
**Talvfelagið Rókur**